# ítróttur

Nr. 30 • Fríggjadagur • 10. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Suni spældi seg inn í hitan



*Suni Olsen er aftur á toppinum eftir drúgvan skaða. Hóskvøldið spældi hann 90 minuttir fyri AaB og var besti spælarin á vøllinum*

**Suni Olsen var besti spælarin á vøllin um, tá ið AaB hóskvøldið vann dyst í Royal League. Suni spældi allan dystin í verjuni hjá AaB og fær stórt rós fyri sítt spæl**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Suni Olsen er rættiliga komin fyri seg aftur, eftir at hann í fjør breyt fótin. Hóskvøldið spældi AaB ímóti Lyn í Royal League, og Suni Olsen var við allar 90 minuttirnar.

Suni spældi høgri bakkur, tí vanligi høgri bakkurin hevði leikbann, og her var avrikið hjá Suna til reint ug.

Heimasíðan hjá AaB skrivar, at Suni Olsen spældi, sum um hann ongantíð hevði gjørt annað enn at spæla høgri bakkur, og heimasíðan vil verða við, at Suni Olsen var besti spælarin á vøllinum.

**Suni gjørdi mistak**

Dysturin hóskvøldið var ímóti norska felagnum Lyn, og AaB vann 2-1. Aab kom á odda 2-0 áðrenn hálvleiki. Seint í dystinum gjørdi Suni Olsen sítt einasta mistak í dystinum, og tann støðan endaði við, at Lyn minkaði um munin til 2-1.

Fleiri enn 3.000 áskoðarar vóru til dystin í Aalborg, hóast tað var kalt og hevði hug at kava.

AaB hevur fyrireikað seg til Royal League og Superliguna við eini venjingarlegu í Turkalandi, har umstøðurnar at venja vóru sera góðar. Nú eru Suni og liðfelagarnir aftur í Danmark, har kuldi og kavi stundum gera tað trupult at venja og spæla.

# Finn nýggjur formaður í HB

**Á nevndarfundi í gjárkvøldi valdi nývalda nevndin í Havnar Bóltfelag Finn Ludvig til nýggjan formann**

FORMANSVAL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Finn Ludvig hevur sitið í nevndini í Havnar Bóltfelag síðani í 1999, og hann er havnarmaður við stórum H.

Sambært heimasíðuni hjá HB hevur tað gingið eitt sindur striltið við at finna nýggjan formann til felagið eftir Birgir Enghamar, sum fór frá á aðalfundinum herfyri, men nú er nýggja nevndin so skipað.

Nýggja nevndin í HB sær soleiðis út: Finn Ludvig, formaður, Niels Juel Arge, varaformaður, Helgi Nielsen, skrivari, Teitur Johannesen, peningarøkil og Johnny Gaard, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Bent Tommy Linklett og Gunnar Mohr.




*38 ára gamli Finn Ludvig bleiv á nevndarfundi í HB í gjárkvøldi valdur til nýggjan formann í síðvanda havnarfelagnum*

*Mynd: www.hb.fo*

## Tamasi verður í Fuglafirði

Seinastu vikuna hevur ÍF havt ein ungarskan spælara til royndarvenjing. Gabor Tamasi er vinstrabeintur spælari, sum serliga verður brúktur fram eftir vøllinum. Hóast Gabor ikki er í kropsligum toppformi enn, hevur hann imponerað fuglfirðingar við sínum spæli, og ÍF hevur tí gjørt avtalu við hann um, at hann skal spæla fyri teir í hesum kappingarárinum. ÍF hevur mist fleiri spælarar síðani í fjør, men ungarski spælarin verður ein góður styrkur hjá felagnum.

## Nógvir áskoðarar

Tað kann roknast við nógvum áskoðarum til steypafinalurnar í hondbólti, sum verða spældar leygardagin. Kvinnufinalan er ímillum Neistan úr Havn og Stjørnuna úr Klaksvík, og hesi bæði feløgini royna nu at mobilisera áskoðarar, so at teirra lið fáa so góðan stuðul sum gjørligt í týdningarmikla dystinum.

Stjørnan skipar fyri ókeypis bussferð úr Leirvík og heimaftur í sambandi við finaluna. Farið verður úr Klaksvík kl. 10.15 leygarmorgunin, og Stjørnan hevur fingið høli í Havn, har áskoðararnir kunnu halda til undan finaluni.

Á heimasíðu sínari roynir Neistin at fáa fólk at koma til dystin. Neistin ætlar at skipa fyri andlitsmáling og biður fólk verða í serligari Neistatroyggjuni.

Lagt er tí upp til eina rætta finaluna leygardagin – eisini á áskoðaraplássunum.

## Útlendingar á veg til Skála

Málmaðurin Vlada Filipovic og útispælarin Milic Curcic koma báðir aftur til Føroya at spæla við Skála. Meðan miðvallarspælarin Nenad Stankovic ikki fekk sítt uppihaldsloyvi í Føroyum longt orsaka av einum lítlum mistaki við lønargjaldinginí hjá honum, eru loyvini hjá Filipovic og Curcic nú í lagi. Heimasíðan hjá Skála skrivar, at loyvini eru komin fram til Beograd, og at nú er bert talan um dagar, áðrenn teir báðir serbarnir koma til Føroya aftur.